# Flata kaninin

Høvundur: Bárður Oskarsson (Føroyar)
Myndprýðari: Bárður Oskarsson (Føroyar)
Bókadeild Føroya Lærarafelags, 2011

Í uppskoti til Bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins 2014

Søgugongd: Ein hundur finnur eina flata kanin á vegnum og saman við eini rottu roynir hann at finna útav, hvat tey skulu gera við kaninina. Vit fylgja teimum, meðan teir royna at hjálpa vini teirra. Ein fín søga um deyðan, har orðið deyðin ongantíð verður nevnt.

Evni: vinalag, djór, heimspeki, deyðin




ISBN 978-952-7572-82-5

## Samtalur og virksemi:

### HYGG OG LES saman við teimum allaryngstu

**Hygg at permuni. Hvat síggja tit? Lesið bókina og prátið saman um myndirnar. Hvat finna hundurin og rottan uppá?**

### TEY YNGRU

**1. Hygg at permuni og baksíðuni. Hvat heldur tú, at bókin snýr seg um?**

**2. Hvat er hent við kaninini?**

**3. Hvørji onnur djór eru við í søguni?**

**4. Hvussu heldur tú, at tað kennist fyri hundin og rottuna, tá tey finna kaninina?**

**5. Hyggið at myndunum saman. Hvat hendir í søguni?**

### MIÐLINGAR

**1. Hvat hevði tú gjørt, um tú hevði funnið eina flata kanin? Gera vinirnir tað rætta?**

**2. Hygg at myndunum. Hvat mann vera hent? Hví liggur kaninin á vegnum?**

**3. Hygg at myndini, har hundurin og rottan sita á beinkinum. Hvat hugsa tey um, og hvussu hava tey tað?**

**4. Hugsa um hundin og rottuna. Hvussu eru tey, og hvørjar eginleikar hava tey?**

**5. Hugsa um heitið á bókini. Hvat sigur heitið tær?**

**6. Hvat fær bókin teg at hugsa um?**

**7. Blaðið í bókini saman tvey og tvey. Er nakað, sum tit halda vera stuttligt?**

### TEY STØRRU BØRNINI

**1. Hvat dámdi tær bókina? Var nakað, sum tær ikki dámdi? Var nakað, sum var torført at skilja? Sært tú mynstur og líkleikar við aðrar søgur?**

**2. Hugsa um søguna frá ymiskum sjónarhornum. Hvussu heldur tú, at kaninin, rottan og hundurin hava tað?**

**3. Hygg at myndini við fuglinum á síðstu síðu. Hvat heldur tú, at rithøvundurin roynir at siga? Hvussu heldur tú, at bókin endar?**

**4. Samrøðan millum tær smáu og stóru tekningarnar í bókini eru spennandi. Hvussu tulkar tú tær?**

**5. Í bókini er nógv, sum ikki verður sagt. Hvat halda tit tað er, sum ikki verður sagt? Hvat hugsar tú, tá tú hevur lisið bókina?**

**6. Skriva eina minnisyrking til fløtu kaninina.**

**7. Hygg nærri at øðrum myndabókum eftir sama høvund. Hvørjar tankar fært tú av hansara myndum?**

**8. Finn nakrar myndabøkur, ið snúgva seg um deyðan. Hvussu verður hetta trupla evnið viðgjørt í teimum bókunum, tú hevur valt? Hvussu heldur tú tað vera best at viðgera eina sorgargongd? Tosið saman tvey og tvey.**

**LES EISINI:**
**Træið eftir Bárður Oskarsson**
**Stríðið um tað góða grasið eftir Bárð Oskarsson**
**Loftar tú mær? eftir Rakel Helmsdal**

## MÁLBITIN

# "Deyðin"

| svenskt | danskt | norskt | íslendskt | føroyskt | grønlendskt | finskt | norðursamiskt |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Döden** | **Døden** | **Døden** | **Dauðinn** | **Deyðin** | **Toqu** | **Kuolema** | **Jápmin** |



Frámerkið myndir av tykkara lesiupplivingum við **#nordiskabokslukaren!**